# Ert tú nýggja móttøkufólkið í Tinganesi?

## UM STARVIÐ

Løgmansskrivstovan leitar eftir nýggjum starvsfelaga til eitt hálvtíðarstarv sum móttøkufólk.
Móttøkan í Tinganesi fevnir um Løgmansskrivstovuna, Fíggjarmálaráðið og Uttanríkis- og vinnumálaráðið.
Tín leiklutur sum móttøkufólk verður fyrst og fremst at taka ímóti gestum, fyrireika fundir og svara fyrispurningum.

## SKAL EG SØKJA?

Í móttøkuni møtir tú nógvum gestum gjøgnum dagin.
Vit leita eftir einum móttøkufólki, sum er fyrikomandi og trívist væl at samskifta andlit til andlits.
Vit ímynda okkum, at tú skipar teg væl, arbeiðir sjálvstøðugt og sært virði í at veita eina góða tænastu.
Um tú kennir teg aftur í hesum, er hetta møguliga rætta starvið til tín at søkja.

## SETANARVIÐURSKIFTI

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.
Tænastustaðurin er í løtuni Løgmansskrivstovan.
Starvið verður sett eftir nærri avtalu, og sjálva arbeiðstíðina avtala vit í felag.

## SØK STARVIÐ HER

Tú ert vælkomin at senda okkum umsókn, lívsrensl og møgulig viðmæli til starv@tinganes.fo.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Freistin at søkja er 10. august 2023.



Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at senda eini boð til elisabeth@tinganes.fo ella ringja á telefon 556122.
Vit gleða okkum at hoyra frá tær.

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office